# Hvør brævatkvøða telur - og verður tald!

**"Innast í opna plássinum í Snarskivuni stendur búrið, har eg eina løtu sleppi at vera einsamallur við valevnunum. Eg fari innar og koyri gardinuna fyri. Á borðinum liggur listin við øllum valevnunum á, og eg má líka tjekka nøvnini av einaferð enn, um nú "mín" maður stavast við "-ur" ella ikki. Her telur jú hvør einstøk atkvøða, og tí er neyðugt at atkvøðan ikki verður ógyldað, tí tey ikki skilja tað ið skrivað er á. Eg ynski sjálvandi at hon verður tald við, eins og allar hinar"**



*Aftur hesaferð kunnu vit gera okkara ávirkan galdandi, nú kommunval er kring landið. Aftaná verða atkvøðurnar taldar upp, og her kann tað vísa seg at júst tín atkvøða kann hava avgerandi ávirkan*

HUGLEIÐINGAR UM EITT BÝRÁÐSVAL
*Snorri Brend*

Fyri viku síðani fóru amerikanarar á val at velja forseta, og í sama viðfangi partar av Senatinum og Umboðsmannatinginum. Og nú skal so okkara lokala "umboðsmannating" í bygd og bý veljast.

Við spenningi fylgdu vit øll, meðan uppteljingin fór fram í USA. Veljarakanningarnar boðaðu frá einum sera jøvnum vali, har úrslitið kundi fara báðar vegir. Hóast omanfyri 130 milliónir amerikanarar høvdu valrætt, so stóð øllum greitt, at her taldi hvør einasta atkvøða. Her kundu nakrar heilt fáar atkvøður avgera um Bush ella Kerry fór at vinna.

Vit minnast alt rokilsið eftir forsetavalið fyri fýra árum síðani, og tí varð gjørt greitt, at hetta skuldi ikki endurtaka seg í ár. Demokratarnir vóru serliga upptiknir av hesum, og vit minnast týðiliga orð teirra, tá teir søgdu valkvøldið søgdu: "Every vote counts, and every vote will be counted" (allar atkvøðurnar telja, og allar atkvøðurnar skulu teljast).

Hóast væl var talt, so bleiv úrslitið kortini ikki sum demokratarnir og mong onnur, eg kortini undantikin, høvdu væntað. Bush varð afturvaldur fyri fýra ár aftrat, sum vit vita. Nå, men aftur til okkara kommunuval, har fleiri av politikkarunum eisini ynskja at verða afturvaldir.

### Vit hava seinasta orðið

Týsdagin 9. november er so møguleiki hjá øllum føroyskum veljarum at kjósa sær umboð at stýra bý- og bygdaráðum tey komandi fýra árini.

Hvat úrslitið verður av býráðsvalinum í Havn er ikki gott at vita. Onkrar kanningar hava verið gjørdar, og vísa tær at summir flokkar fara at gera eitt gott val, meðan aðrir helst verða vónsviknir. Hesar kanningar kunnu tó ikki reingja tann veruleikan, at tað eru vit sum veljarar sum hava tað seinasta og avgerandi orðið at siga í hesum málinum.

Nú havi eg sjálvur altíð verð á vali, meðan eg havi verið heima. Og eg hevði sjálvandi sæð fram til at nýta mín demokratiska rætt enn einaferð nú týsdagin. Men fríggjadagin broyttust hesar umstøður fullkomuliga, tá vit fingu deyðsboðini av ommu konu míni. Jarðarferðin verður sjálvan valdagin. So í ár gjørdist alt øðrvísi.

Men demokrati'ið sveik kortini ikki okkum demokratar. Tíbetur var ein møguleiki at bøta um hetta, nevniliga við at greiða brævatkvøðu í Snarskivuni. Sum sagt, so gjørt!

### Eingin kø við diskin

Eg veit ikki hví, men eg hevði væntað eina kø av fólki uttanfyri Snarskivuna, tá eg seinnapartin leygardagin setti kós oman hagar. Kanska tí at fólk vildu vera vís í at tey sluppu á val hesaferð, um so skuldi borið á, at tey fingu forfall valdagin.

Eg var farin til arbeiðis árla á morgni. Dagvakt mín á Landssjúkrahúsinum var júst liðug, og nú skuldi hetta álvarsmálið við býráðsvalinum avgreiðast: Á fyrsta sinni skuldi eg greiða brævatkvøðu til eitt býráðsval.

Fór til gongu av deildini. Veðrið var heilt hampuligt - eitt lítið lot og nakrir fáir dropar av regni. Men hvat kann tað saka, tá nú demokratiski rættur mín skuldi nýtast. Mong, ið hava sól og summar hvønn einasta dag, høvdu helst ynskt sær henda rættin fram um hitan og einaræðið.

Hevði í útvarpinum hoyrt lýsingina um møguleikan við at kunna greiða atkvøðu undan valinum. Fyrsta lýsingin av hesum slagnum var leygardagin á middegi frá Tvøroyrar Býráði, og eg bað og bønaði bara um, at Tórshavnar Kommuna var eins vakin og allar hinar kommunurnar, sum góvu sínum borgarum henda møguleikan. Ájú, har kom hon so at enda: "Tey, ið ynskja at greiða brævatkvøðu til býráðsvalið 9. november í Havn, kunnu gera hetta í Snarskivuni í dag millum kl. 14 og 18".

Eg læsti meg út av deildini, og fór oman av sjúkrahúsøkinum. Gekk framvið Skipasmiðjuni og Skálatrøð, og ásannaði, at her er lív og vinna í býnum. Kanska ikki besta útróðrarveðrið, men fekk eitt prát við ein mann, sum hevði tikið sær gággulínuna upp. Tvær spannir. Ikki heilt av leið. Onnur línan var fløkt. Gekk víðari framvið standmyndini av Nólsoyar Pálli og Traðarmanninum, og væntaði so smátt, at nú mátti køin uttanfyri Snarskivuna skjótt fara at vísa seg.

Men har var eingin kø at síggja. Har var nakað av fólki í býnum, tí handilsmenn høvdu boðað frá drúgvum leygardegi. Men hinvegin, ikki eitt einasta menniskja uttanfyri Snarskivuna, og heldur ikki eitt einasta menniskja at síggja inni í Snarskivuni, tá eg klokkan 15:15 stundisliga trein inn hagar. Eg mátti hyggja meg væl um, men har var bert eg harinni.

Við diskin í Snarskivuni sóust tvey av starvsfólkum býráðsins, sum vóru komin til arbeiðis henda dagin fyri at avgreiða allar brævatkvøðurnar. íroknað hana frá mær.

### Burturstaddur ella sjúka

Við diskin bar eg fram ørindi míni. Eg hevði gloymt valkortið við hús, men eg mintist bæði kortnummarið og hvørja røð eg skuldi fara í, um eg skuldi valt í Ítróttarhøllini á Hálsi sum ætlað.

Starvskvinnan spurdi um navn, føðidag og bústað, og løtu seinni hevði hon funnið fram tey neyðugu pappírini til brævatkvøðugreiðsluætlan mína.

Skuldi fyrst skriva mínar persónligu upplýsingar á eitt ark, og skuldi svara um talan var um eitt løgtingsval ella býráðsval. Síðani kom ein heldur løgin og ein heldur persónligur spurningur: Eg skuldi nú siga, hví eg ynskti at greiða brævatkvøðu, og ikki fór á valstaðið týsdagin sum tey flestu. Hesin spurningurin fekk meg at steðga á eina løtu. Hetta var dog ein løgin spurningur.

Nú hevði eg lógliga umbering fyri ikki at kunna greiða atkvøðu á valstaðnum, men møguleikarnir at siga frá, hví ein annars ikki fór at greiða atkvøðu sjálvan valdagin vóru sera avmarkaðir. Í veruleikanum vóru teir bert tvinnandir: 1) Veljarin er ikki staddur í Tórshavnar Kommunu valdagin, ella 2) Veljarin er sjúkur valdagin - kanska seingjarliggjandi, og kann ikki fara á val, hóast hann kanska fegin ynskti tað. Bert tveir møguleikar, altso!

### Tveir møguleikar

Nú er valið skipað soleiðis at valhølini eru opin fra morgni til út á kvøldi, soleiðis at øll við vanligum arbeiði kunnu greiða atkvøðu í hesum tíðarbili. Fyri starvsfelagar mínar á Deild 2 standa tvinnandir møguleikar opnir: Ert tú dagvakt, frá kl. 7 til 15, kanst tú velja aftaná arbeiðstíð, og fert í kvøldvakt, frá kl. 15 til 23, kanst tú velja áðrenn tú fert til arbeiðis. Og ert tú í náttarvakt kanst tú fara á valstaðið, tá tú vaknar einaferð út á seinnapartin.

Tann tankin kom til mín, meðan eg setti krossin við tann fyrra møguleikan (altso at eg var burturstaddur valdagin), at her vóru møguleikarnir rættiliga avmarkaðir. Skalt tú burtur í bygd, í annað land ella okkurt, kanska sjúka, kemur í vegin, so er hetta ein kærkomin møguleiki at greiða sína atkvøðu.

Men um eg nú í mínum arbeiði varð noyddur at arbeiða frá morgni til myrkurs, altso frá kl. 7 til 23, tí okkurt óvæntað hendi, hvat skuldi eg so krossa av fyri? Og hetta hendi hóast eg var staddur í Tórshavnar kommunu, men varð forðaður av arbeiðsumstøðunum á hesi deildini sum kunnu vera so, at eitt mannligt starvsfólk ikki kann fara av deildini. Ella, um eg nú snøgt sagt ætlaði mær at atkvøða, men ikki hevði hug at fara á valstaðið sjálvan valdagin at greiða atkvøðu, hvat skuldi eg so havt krossað av fyri við brævatkvøðugreiðsluna? Lúgva, kundi eg ikki funnið uppá, men her vantar altso ein triði møguleiki!

Nå, men meðan eg havi hugsað um hetta, havi eg ikki gáað eftir at eini hjún eru komin yvir til hin diskin. Tey eru komin í somu ørindum sum eg. Tey hava helst minst til at taka valkortið við, so teirra avgreiðsla tekur styttri tíð enn mín, og vit fara í roynd og veru avstað ísenn.

### Við ella uttan »-ur«

Nú er tann formelli og administrativi parturin avgreiddur, og nú stendur tann álvarsami og demokratiski parturin á skránni: Krossurin skal setast við eitt av teimum mongu valevnunum. Men nei, - eingin krossur skal setast í dag. Her er jú talan um brævatkvøður, so her er mannagongdin ikki tann sama sum á tí vanliga valstaðnum.

Fryntliga starvskvinnan handar mær nevniliga eitt blankt kort, har tað bert stendur skrivað eittans orðið: "Atkvøðuseðil". Hetta kortið skal eg koyra niður í ein brævbjálva, tá liðugt er. Her skal eingin krossur setast, bara navnið á flokkinum ella manninum, eg ætli mær at velja.

I nnast í opna plássinum í Snarskivuni stendur búrið, har eg eina løtu sleppi at vera einsamallur við valevnunum. Eg fari innar og koyri gardinuna fyri. Á borðinum liggur listin við øllum valevnunum á, og eg má líka tjekka nøvnini av einaferð enn, um nú "mín" maður stavast við "-ur" ella ikki. Her telur jú hvør einstøk atvøða, og tí er neyðugt at atkvøðan ikki verður ógyldað, tí tey ikki skilja tað ið skrivað er. Eg ynski sjálvandi at hon verður tald við, eins og allar hinar. Atkvøðugreiðslan er liðug. Kortið fer í brævbjálvan og býráðsvalið 2004 er avgjørt frá mínari síðu. Klokkan var tá 15:25.

Í búrinum lógu fleiri pennar, har "Red Barnet" stóð á. Hetta kundi verið dømi um eitt av mongum vallyftum, sum var frammi við seinasta val, og sum nú eru loyst: Røktarpláss til tey eldru; og ikki minst, at bíðilistin eftir ansingarplássi er søga í dag. Men tað er kortini ikki nóg mikið. Eg kundi ynskt at hoyrt fleiri nýggj vallyfti um at gera nakað fyri at bjarga okkara børnum eina ljósa og trygga framtíð. Eisini sum Havnarborgarar.

Vónandi fer hetta nýggja býráðið, sum nú skal mannast, at tryggja okkara vakra ungdómi tær bestu umstøðurnar at mennast og trívast í høvuðstaðnum.

Tú kanst eisini fáa ávirkan her. Far á val í dag. Her kann eisini tín atkvøða gera mun. Og verð vísur í at hon verður tald!



# Barna-OL í Gundadali

**Mikudagin, hósdagin og fríggjadagin verður eitt stórt tiltak fyri eini 400 børnum í Gundadalsøkinum. Talan er um eitt sonevnt Barna-OL, har børnini sleppa at kappast og hugna sær saman**

BARNA-OL
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Øll børn, sum ganga í frítíðarskúlum í Havn ella á Margarinfabrikkini, sleppa komandi dagarnar, at beistast og hugna sær í Gundadali.

Ìtróttarhøllin á Hálsi, Badmintonhøllin, parkeringsøkið uttanfyri Badmintonhøllina, vallirnir og virðarlundin verða nevniliga karmur um eitt sera forvitnsligt tiltak komandi tríggjar dagarnar.

Eini 400 børn fara at renna stafettir og kappast á ymsan hátt, tey fara á eina skattajakt í viðarlundini og mangt annað.

Børnini fara at renna runt á øllum økinum, til hesar ymsu postarnar, har tiltøkini verða gjørd saman við børnunum.

Bogi Andreasen, sum dagliga er pedagogur á Margarinfabrikkini sigur, at hetta verður eitt tiltak, sum fer at loyva børnunum at hugna sær saman.

### Fjølbroytt skrá

Bogi greiðir frá, at tveir teir fyrstu dagarnir serliga verða merktir av kappingum, meðan seinasti dagurin verður merktur av hugna.

– Vit hava leigað eina hoppiborg, og vit hava fingið løgregluna og brandmennirnar at koma oman at vísa okkum sínar bilar. So verða eisini onnur spennandi tiltøk á skránni, greiðir Bogi frá.

Hann sigur, at tað ikki fer at kosta børnunum nakað at verða við, tí tiltakið er fíggjað av øllum frítíðarskúlunum í felag, umftramt at Tórshavnar Kommuna eisini hjálpir til fíggjarliga.

**Ì sambandi við barna-OL dagarnar, heitir Bogi Andreassen á allar bilførarar, um at vísa størsta varðsemi, tá ið koyrt verður í Gundadalsøkinum miku-, hós- og fríggjadagin. Umleið 400 børn fara at renna runt á øllum økinum, so koyrið varliga!**

# Føroya Egg víðkað



*Nýggi bygningurin hjá virkinum Føroya Egg á Velbastað. Tilsamans hevur virkið nú 1250 fermetrar at ráða yvir, og 10.400 hønur eru »fluttar inn«. Í februar kemur væntandi næsta vøran av Velbastað, nevniliga høsnakjøt.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Ì gjár kom ein stór sending av hønum til landið. Talan er um hønurnar hjá Annfinni Brekkstein, sum nú eru komnar upp á pláss í nýggja bygninginum hjá Føroya Egg á Velbastað**

ÚTBYGGING
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Nýggi bygningurin hjá Annfinni Brekkstein er nú klárur at taka í nýtslu, og hønurnar eru eisini komnar upp á pláss, í tí nú 1250 fermetra stóru fyritøkunui.

– Vit hava fingið 410 fermetrar afturat gamla bygninginum. Tað var avgjørt neyðugt við eini útbygging, tí eggini eru sera væl umtókt. Tey eru útseld hvønn dag, sigur Annfinn Brekkstein.

Føroya Egg fáast til keyps um alt landið, og fyri at fáa eina javna og góða framleiðslu, var neyðugt hjá Annfinni at fáa sær fleiri hønur.

– Nú havi eg tilsamans 10.400 hønur. Tær síðstu komu til landið í gjár, og tær eru komnar upp á pláss, greiðir Annfinn frá.

### Høsnakjøt til sølu

Næsta stigi, sum Annfinn Brekkstein ætlar sær at taka, er, at hann umframt at selja egg, fer undir at selja høsnakjøt.

– Við í nýggju útbygginini er eisini útgerð til eitt høsnasláturvirki. Ætlanin er, at føroyingar, umframt egg, eisini skulu fáa hønur av Velbastað. Øll útgerðin er klár at taka í nýtslu, og tær fyrstu hønurnar av Velbastað verða á marknaðinum í februar. Talan er ikki um høsnarungar, men um 18 mánðar gamlar hønur, sigur Annfinn.

Sum er, arbeiða tveir mans á eggjavirkinum, umframt vikuskiftis-avloysarar, men Annfinn væntar, at teir nú mugu fara at verða fleiri.

Í sambandi við sláturvirkið, havi eg fleiri menn at trekkja uppá, so tað verður einki problem. Tað verður nakað, sum vit fara at klára sjálvir, sigur Annfinn at enda.



# Gullmyndin

Hóast tað enn ikki er staðfest hvør mynd hjá Per á Hædd vann kappingina, so væntar fotografurin sjálvur, at tað er hendan omanfyri.

Per vann fyrsta prís í kappingini um »Form og Figur«. Hetta má sigast at verða ótrúliga flott, tí nógvir kendir fotografar vóru við í kappingini. M.a. varð favoritturin hjá Peri, kenda Inga Aasmul nr 3 í somu kapping.

Myndin hjá Peri vísir eina nakna kvinnu, sum kemur inn í myndina vinstrumegin og eina stóra krukku, sum kemur inn í myndina høgrumegin.

Per sigur sjálvur, at hann aldri hevur luttikið í nakrari tílíkari kapping áður, men at hann fekk hugskotið til hesa myndina, tá hann sá evnið »Form og Figur«. Hugskotið bar allanvegin til eina gullmedalju.

**eys**

# Útbyggja brennistøðina

**Ovnar og fjarhitaskipan skulu broyst, og tí verður ikki brent í tvær vikur**

IRF
*Jákup Mørk*

Tað eru ovnarnir sjálvir, sum verða mál fyri broytingunum, sum nú skulu gerast. Partur av stýrisskipanini til ovnarnar, skal skiftast, tí hendan við tíðini gerst alt meira trupul at viðlíkahalda. Hartil skulu ymsar broytingar gerast í sjálvum ovninum, soleiðis at hann fær nakað størri orku, eins og hann við hesum kemur at lúka nøkur av krøvunum, sum nýggja umhvørvisgóðkenningin fer at seta.

Umbyggingarnar merkja, at einki rusk verður brent í døgunum, 28. november til 12. desember. Hesar dagar fer brennistøðin bert at taka móti ruski, sum luktar, ella sum á annan hátt ikki kann bíða.

Seinni í mánaðinum verður kunngjørt nærri, hvussu innsavningin av ruski og burturkastið, sum skal brennast, verður skipað. Innsavning av pappi, jarni og øðrum burturkastið verður sum vanligt.